UTTAN ÚR HEIMI

Finst at donsku stjórnini

Mannarættindafelagsskapurin Amnesty International finst at donsku stjórnini, nú tað er komið fram, at danski ríkisborgarin, sum sat fangi í Guantanamo, varð illa eyðmíktur.

Lars Normann Jørgensen, sum er aðalskrivari í donsku deildini hjá AI, sigur við TV2, at tað er eingin ivi um, at amerikonsku fangavørðarnir brutu reglurnar í Genevesáttmálanum, tá danin var fangi í Kandaharleguni í Afghanistan. Seinni varð hann fluttur til Guantanamo í Kuba.

Donsku myndugleikarnir hava fleiri ferðir avhoyrt mannin, men har hevur hann ongantíð sagt, at hann bleiv illa eyðmíktur. Fregnartænastan hjá donsku løgreglunihevur eisini avhoyrt hann, og fregnartænastan vísir skuldsetingunum um eyðmíking aftur. Per Stig Møller, uttanríkisráðharri, hitti eisini fangan, eftir at hann var komin aftur til Danmarkar, og ráðharrin hevur sagt, at undir samrøðunum nevndi maðurin einki um, at hann hevði fingið ringa viðferð.

Skotin í rullistóli

Sunnudagin skutu ísraelskir hermenn ein palestina, sum sat í rullistóli.

Palestinar, sum sóu tilburðin, hava greitt frá, at nakrir ísraelskir hermenn skutu eftir palestinum í einari flóttafólkalegu nærhendis býnum Ramallah á Vestara Áarbakka. Men eingin dugir rættiliga at siga frá, hvussu tað kundi bera til, at hermenninir skutu tann 31 ára gamla Arafat Ibrahim Yacub, sum sat í rullistóli.

Arafat Ibrahim Yacub hevði sitið í rullistóli síðani 1987, tá hann bleiv skotin í ryggin undir tí fyrsta palestinska uppreistrinum. Hann var giftur og átti tvey børn, skrivar Reuters.

Njósnari skrivað bók

Fyrrverandi norski diplomaturin Arne Treholt, sum fekk langa fongsulsrevsing fyri at hava njósnast fyri Sovjetsamveldið, hevur skrivað eina bók við sínum endurminningum. Bókin er ikki minni enn 500 síður stór.

Í bókini, sum eitur "Gråzoner", og sum er komin út í Noregi og Danmark, viðger Arne Treholt tað, endaði við, at hann bleiv tikin ein dagin í januar í 1984. Sjálvur sigur høvundurin, at hann vil fegin hava fólk at tosa um dómin, sum hann fekk. Hann væntar ikki, at bókin fer at elva til ta stóru umrøðuna í Noregi, men hann hevur harafturímóti betri vónir um, at danir fara at viðgera mál hansara.

Sjálvur hevur Arne Treholt sagt, at dómurin ímóti sær var ein tann seinasti vørrurin undir kalda krígnum.

Danir misnýta neyðkallið

Teir donsku alarmsentralarnir kæra seg um, at alt ov nógv fólk ringja til alarmsentralin, sjálvt um ørindini ikki eru so átroðkandi.

Hagtøl hjá alarmsentralinum í Keypmannahavn vísa, at har ringja fólk umleið 1.000 ferðir til alarmsentralin um dagin. Kortini vísir tað seg, at bara í 220 førum er støðan so álvarssom, at tað er neyðugt at senda ein sjúkrabil á staðið. Hini næstan 800 kundu eins væl ringt til vaktlæknan, skaðastovuna ella sín egna lækna, skrivar Berlingske Tidende. Ofta vísir tað seg eisini, at fólk áttu heldur at ringt eftir einum hýruvogni enn einum sjúkrabili. Í Århus siga tey tað sama. Har verður sagt, at tað eru ikki meiri enn 30 prosent av teimum, sum ringja 112, ið veruliga hava tørv á skjótari hjálp.

Berlingske Tidende skrivar, at í framtíðini ætla alarmsentralarnir at gera meiri burtur úr at skilja ímillum tey, sum hava tørv á skjótari hjálp, og tey, sum eins væl kunnu ringja til vaktlæknan ella leiga ein hýruvogn heldur enn at senda boð eftir einum sjúkrabili.

Stórsligið minningarhald

17 ríkisleiðarar og nógvir gamlir hermenn vóru hjástaddir til 60 ára minningarhaldið fyri D-dagin

MINNINGARHALD
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Tann 6. juni í 1944 settu teir sameindu 156.000 hermenn á land í Norðurfraklandi, og landgongdin gjørdist byrjanin til endan á seinna heimsbardaga.

Á 60 ára degnum sunnudagin vóru fleiri av teimum nú meiri enn 80 ára gomlu hermonnunum komnir aftur á fronsku strondina. USA, Kanada, Bretland, Avstralia og Belgia høvdu sent hvør sína deild av gomlum hermonnum til Fraklands, og úr fleiri øðrum londum vóru gamlir hermenn komnir at minnast teir felagarnar, sum fullu í fronsku fjøruni D-dagin.

Forsetarnir Jacques Chirac, George W. Bush og Vladimir Putin vóru til minningarhaldið saman við millum annað Elizabeth drotning, Haraldi kongi og niðurlendsku drotningini Beatrix. Chirac helt røðu til minnis um teir falnu, og hann gav nøkrum av teimum gomlu hermonnunum heiðurstekin fyri teirra avrik. Teirra millum var tann 83 ára gamli norðmaðurin Gunnar Knudsen, sum var kokkur umborð á einum skipi, sum flutti útgerð um Ermasund D-dagin.

Í minnisrøðuni takkaði Chirac hermonnunum, sum komu á land í Norðurfraklandi, og hann mintist eisini teir russisku hermenninar, sum bardust ímóti týskarunum við Moskva, Stalingrad og Kursk.

Teir flestu hermenninir, sum fóru upp á land í Normandínum D-dagin, vóru amerikanarar, og undir menningarhaldinum segði George W. Bush, forseti, at USA hevði verið til reiðar at gera tað sama í dag fyri at hjálpa sínum vinum.

Hann gav amerikanarum sjálvsálitið aftur

Amerikanararnir minnast Ronald Reagan sum tann bjartskygda forsetan, ið broytti USA

USA
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Leygardagin doyði fyrrverandi amerikanski forsetin Ronald Reagan eftir drúgva alzheimerssjúku. Hann var 93 ára gamal.

Hann var filmsleikari, áðrenn hann fór upp í politikk, og tær royndirnar nýtti hann eisini í sínum politiska lívi. Ja, tað er sagt, at hansara mótstøðumenn plagdu at siga, at leikluturin sum amerikanskur forseti var tann besti leikluturin, sum hann nakrantíð hevði spælt.

Innanríkispolitiskt vann hann forsetavalið í 1981 við einari valskrá, sum hevði til endamáls at skerja tær almennu útreiðslurnar, men tá hann fór frá átta ár seinni, var skuldin hjá tí almenna næstan tríggjar ferðir størri, enn tá hann tók við.

Men tað er uttanríkispolitikkurin, sum Ronald Reagan verður mintur fyri. Hann var sera hvassorðaður, tá tað galt Sovjetsamveldið, sum hann skýrdi "tað óndsinnaða veldið", men kortini gjørdi hann av at samstarva við Mikhail Gorbatjov, og tað var hetta samstarv, sum gjørdist byrjanin til endan á Sovjetsamveldinum. Serliga kend eru orð hansara við Berlin-múrin: "Harra Gorbatjov. Brót hendan múrin niður".

Men alt var ikki so ljósareytt á tí uttanríkispolitiska økinum. Tað bleiv avdúkað, at USA seldi prestastýrinum í Iran vápn, og at pengarnir frá vápnasøluni fóru til at fíggja uppreistrarfelagsskapin Contras í Nikaragua.

Men amerikanararnir hildu av Ronald Reagan, og tá hann legði frá sær í 1989, var hann framvegis tann best umtókti forsetin, sum USA hevði havt.

Reagan fer til gravar fríggjadagin. Hann verður jarðaður uttan fyri Ronad Reagan-bókasavnið í Simi Valley í Kalifornia.

Ronald Reagan

ítróttur

Nr. 106 • týsdagur • 8. juni 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Kappróður

Drúgv frásøgn frá kappróðrinum á norðoyastevnu verður í mikudagsblaðnum

Býarkoyring í Klaksvík

Tað eydnaðist Christiani Guttesen at spurta seg til sigurs, tá býarkoyringin í Klaksvík varð súkklað á norðoyastevnu

SÚKKLING
Tíðindaskriv

Leygardagin stóð næsta súkklukappingin í ár á skránni. Kappingin gekk fyri seg í Klaksvík í samband við norðoyastevnu, sum var í vikuskiftinum.

Skipað varð fyri kappingum millum børn, unglingar og vaksnum. Kappast varð millum bæði gentur og dreingir.

Kappast bleiv í býarkoyring, og gekk leiðin runt Biskupsstøðgøtu, Skúlavegur, Gerðagøtu.

Teir vaksnu koyrdi í 45 min. + 1 umgang Hendan kapping vísti seg at blíva sera spenandi. Eftir einum korteri lukkaðist tað Eli og Christiani at sleppa leysir frá hinum, men felti aftanfyri settu jagtina í gongd eftur teimum. Eli og Christian funnu tó gott útav tí og klaraðu, at halda avstand og til síst fangaðu teir hinar aftur við einum umgangi.

Tá endin var nær, bleiv hugsað meir um fysta plássið, og komin út a sísta umgang, royndi Eli at sleppa frá Christian, men hetta lukkaðist ikki, teir komu lið um lið á teir sístu 50 metrarnar, og í endaspurtinum lukkaðist tað Christian at vinna.

Á triða plássi kom Esmar Joensen.

Unglingar koyrdu saman við teimum vaksnu, og her vann Bergur Johansen framanfyri Torkil Weyhe.

Kappast var í hesum bólkum hjá bæði dreingjum og gentum:

Bólkur I:	1996 til 1998
Bólkur II:	1993 til 1995
Bólkur III:	1990 til 1992
Ungdómur:	1987 til 1989
Vaksin:	1986 og eldri

Úrslitini frá norðoyastevnuni vóru hesi:

Bólkur 1 (1 umgangur)
Dreingir
1 Jóannes Albert Nielsen
2 Martin Olsen
3 Tóri Nielsen

Gentur
1 Bjørk
2 Maria

Bólkur 2 (3 umg.)
Dreingir
1 David Langgard
2 Kári
3 Kristian

Gentur
1 Elsa Krosstein

Bólkur 3 (5. umg.)
Dreingir
1 Rúni Bláfoss
2 Rani G. Jacobsen
3 Niels Kristensen

Gentur
1 Gerda
2 Sára Olsen
3 Elsa F. Petersen

Ungdómur (45 mi + 1 umg.)
Unglingar
1 Bergur Johansen
2 Torkil Weyhe

Vaksin (45 min + 1 umg.)
1 Christian Guttesen
2 Eli Christiansen
3 Esmar Joensen

Næsta kapping verður á Eystanstevnu í Runavík, og koyrt verður leygardagin 12. juni. Koyrt verður Býarkoyring. Lýst verður í skránni nær kappingin byrjar.

Christian Guttesen gjørdist vinnari av norðoyastevnusúkklingini hjá teimum vaksnu

Nýtt venjarapar í Sumba

Sumbingar høvdu í fjør og higartil í ár Robert Ciezlewicz sum leikandi venjara, men eftir dystinn móti KÍ í seinastu viku varð hetta broytt.

Tá gjørdi pólverski av, at hann ikki longur helt sær til at standa á odda fyri liðnum, og tí hevur talan hesa vikuna verð um nýggjan venjara.

Hesin er hin pólverski leikarin, Norbert Lucak, og afturat sær dystinar hevur hann so fingið játtað hjálp frá Frits Poulsen.

-jm